# Heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 24. juni 2024 |
| Mál nr.: | 24/03400 |
| Málsviðgjørt: | AS |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág og løgtingslóg um ókeypis koppseting móti ávísum smittandi sjúkum**
(Apotekari kann seta í starv heilsustarvsfólk at koppseta fyri apoteksverkið, og partur B og ávísar aðrar greinar verða strikaðar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

“**Løgtingslóg um apoteksverkið**”

**2.** Í § 4 verða aftan á stk. 2 sum nýggj stk. sett:
“*Stk. 3.* Apotekari kann gera avtalu við ella seta í starv heilsustarvsfólk, ið kann koppseta, til tess at koppseta fyri apoteksverkið.
*Stk. 4.* Landsstýrisfólkið ásetir reglur um, hvørjar koppsetingar apotek kunnu bjóða.”

**3.** § 17 verður strikað.

**4.** Heitið á kapitli IV verður orðað soleiðis:

**“Handkeypssølur”**

**5.** §§ 20 og 21 verða strikaðar.

**6.** Partur B verður strikaður.

**7.** § 51, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis:
“Um ikki størri revsing er uppiborin eftir aðrari lóg, kann tann revsast við sekt sum:
1) ger brot móti § 2, stk. 1 og 2 ella § 4,
2) fjónar treytir sum liggja við sum loyvi ella góðkenning sambært lógarinnar § 4, stk. 2, § 19, stk. 2, § 21, stk. 3 ella

sambært fyriskipanum, sum ásettar eru við heimild í lógini,
*Stk. 2.* Sekt kann verða givin sum revsing fyri brot móti fyriskipanum, sum ásettar eru við heimild í lógarinnar § 9, 1. stk. og § 18.

**§ 2**

Í løgtingslóg nr. 118 frá 12. desember 2007 um ókeypis koppseting móti ávísum smittandi sjúkum verður í § 2, stk. 1, nr. 3 “hvørjir læknar” broytt til: “hvørji heilsustarvsfólk”:

**§ 3**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Kunngerðir, sum eru settar í gildi sambært Løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2020, og sum ikki eru í ósamsvari við hesa lóg ella lóg um heilivág, verða verandi í gildi, til tær verða settar úr gildi ella verða avloystar av reglum, givnum við heimild í hesi lóg ella løgtingslóg um heilivág.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Apoteksverkið er ein týdningarmikil partur av heilsuverkinum. Trýstið á heilsuverkið økist, og tørvur er á, at apoteksverkið í størri mun er við til at lyfta tær felags heilsuuppgávur, sum eru.

Skotið verður upp at apotekarar fáa møguleika fyri at gera avtalu við ella seta í starv heilsustarvsfólk, ið kann koppseta, til tess at koppseta fyri apoteksverkið.

Skotið verður upp at strika part B, sum ásetur reglur um heilivág. Uppskotið skal lesast í tí samanhangi, at reglurnar um heilivág verða ásettar í endurskoðaðum líki í uppskoti til løgtingslóg um heilivág.

Skotið verður upp at strika greinirnar 17, 20 og 21, sum áseta reglur um heilivág, við tí fyri eyga at staðseta tær við ávísum smærri broytingum í uppskoti til løgtingslóg um heilivág.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Løgtingslóg um apoteksverkið og heilivág fekk gildi í 1989 og hevur sostatt 35 ár á baki. Smærri broytingar eru gjørdar í lógini í 1991, 2014, 2015 og 2020. Lógin er býtt sundur í tríggjar partar, partur A, B og C. Partur A ásetur viðurskifti hjá apotekum, til dømis starvsfólka-hølis- og fíggjarviðurskifti. Partur B ásetur viðurskifti um heilivág, til dømis heilivágshugtakið og lýsingar um heilivág. Partur C ásetur viðurskifti um gildiskomu, revsing og eftirlit.

Í § 4, stk. 1 í galdandi lóg er eitt forboð ímóti, at apotekari kann vera í vinnu sum lækni, tannlækni ella djóralækni. Innihaldsliga svarar ásetingin til ásetingina í donsku lógini frá 1984, og hevur sín uppruna í donsku apotekaralógini frá 1932. Tað stendur í viðmerkingunum til ásetingina, at hon hevur til endamáls at fyribyrgja møguligum misbrúki.

Ásetingin hevur við sær, at apotekari ikki kann ávísa heilivág, sum viðkomandi apotekari eftir hetta sjálvur kann selja, og ein lækni ikki kann selja heilivág, sum viðkomandi lækni sjálvur hevur ávíst. Ásetingin kemur til lívs tað, at apotekari – ella lækni – misbrúkar heilivág.

Ásetingin er viðkomandi í Danmark havandi í huga, at apoteksskipanin byggir á, at privatir loyvishavarar reka apotek sum eina privata fyritøku við teimum avmarkingum, sum avvarðandi myndugleikar hava sett.

Apotekarar í Føroyum ávísa ikki heilivág samstundis við, at teir forvinna sær pening við at selja heilivágin. Føroyska apoteksverkið er alment og møguligt avlop av sølu av heilivági fer ikki til apotekaran persónliga, men fellur aftur til landið. Apotekari fær ikki nakran persónligan vinning av meirsølu av heilivági sum kemst av, at hann er í vinnu sum lækni, tannlækni ella djóralækni. Hóast hetta, kann apotekari hava ein áhuga í at selja so nógvan heilivág sum til ber, soleiðis at partur av avlopinum kann brúkast til annað virksemi hjá apotekinum, áðrenn tað fellur aftur til landið. Ásetingin er tí ikki óviðkomandi at varðveita í Føroyum sum eitt útgangsstøði.

Forboðið móti, at apotekari virkar sum lækni, tannlækni ella djóralækni er eitt persónligt forboð fyri apotekaran. Sambært § 8, stk. 1 er tað apotekarin, sum skipar fyri rakstrinum av apotekinum og hevur ábyrgd av, at virkið verður útint forsvarliga og samsvarandi galdandi

ásetanum og givnum fyriskipanum, undir hesum at virka verður ikki sum lækni, tannlækni ella djóralækni á apotekinum. Hetta hevur við sær, at tað virksemi, sum starvsfólkið á apotekunum tekur sær av, er ein partur av persónligu ábyrgdini hjá apotekaranum. Forboðið í § 4 er tí galdandi fyri apotekaran og starvsfólk hjá apotekaranum.

Hetta merkir til dømis, at apotekari ikki kann seta læknar, tannlæknar ella djóralæknar í starv til tess at útinna lækna-, tannlækna ella djóralæknavirksemi, soleiðis at apotekari kann geva harraboð til hesi í stríð við § 4. Apotekari kann sostatt ikki seta ein lækna í starv at koppseta fyri apoteksverkið.

§ 4 forðar tó ikki fyri, at apotekari samstarvar við lækna á ymiskan hátt. Tó skal samstarvið hava støði í øðrum enn læknaligum virksemi. Til dømis kann lækni avtala við apotekara, at apotekarin letur høli ella starvsfólkaorku til ein lækna í sambandi við koppsetingar soleiðis, at starvsfólkið, á sama hátt sum hjálparfólk hjá læknum, kann koppseta á apotekum. Hetta er treytað av, at apotekarin ikki kann geva harraboð til læknan ella starvsfólkið, í mun til tað delegeraða virksemið. Tað má tí týðiliga avtalast, nær starvsfólkið virkar sum starvsfólk undir apotekaranum, og nær starvsfólkið virkar sum hjálparfólk undir læknanum. Hetta má eisini gerast týðiligt fyri viðkomandi starvsfólk.

*Atfinningar, sum kunnu verða ímóti galdandi lóg*
Ein týðandi partur av smittuverjutilbúgvingini er at koppseta fyri smittandi sjúku. Lata fólk seg koppseta, fyribyrgir hetta sjúku og minkar um váðan fyri smittu. Gerst ein, ið er koppsett/ur, sjúk/ur, er sjúkan ikki líka hættislig. Fyri at røkka endamálinum við almenna koppsetingartilboðnum er umráðandi, at ein so stórur partur sum gjørligt av borgarum í vandabólkum, lata seg koppseta.

Heimsheilsustovnurin, WHO, og Evropasamveldið, ES, hava sum mál, at 75 prosent av borgarum í vandabólkinum, tey ið eru í váða fyri at gerast álvarsliga sjúk, verða koppsett fyri influensu.

Í Føroyum fáa pensjónistar, fólk í vandabólkum og starvsfólk á heilsu- og røktarøkinum tilboð um ókeypis influensakoppseting. Tað ber ikki til at siga, hvussu nógv fólk fáa tilboð um ókeypis koppseting, tí fleiri teirra kunnu hoyra til fleiri av málbólkunum. Tó vísa tøl frá Heilsutrygd, at einans 51 prosent av persónum 67 ár og eldri eru koppsett fyri influensu í 2022.

Kanningar úr øðrum londum vísa, at atkoma til tilboð um koppseting, hevur ávirkan á, hvussu nógv fólk velja at taka av tilboðnum um koppseting. Í kanningunum sæst, at ein stutt leið til koppsetingarstaðið, stutt bíðitíð og møguleiki fyri at lata seg koppseta, uttan at bíleggja tíð ella við at bíleggja tíð talgilt, eru viðurskifti, sum økja sannlíkindini fyri at fólk lata seg koppseta.

Galdandi lóg letur í ov lítlan mun upp fyri nøktandi atkomu til koppsetingartilboð, og fyri at fólk í Føroyum kunnu lata seg koppseta, har sum tey ynskja.

Leikluturin hjá apotekunum kann verða við til at virka fyri at fyribyrgja sjúku og koma tættari at málinum hjá WHO og ES.

Undir koronutíðini í Føroyum vísti tað seg at vera tørvur á at skipa tilboðið um koppseting øðrvísi. Fyrstu tíðina hevði Sjúkrahúsverkið ábyrgdina av og skipaði fyri COVID-19 koppsetingini. Koppsetingin fór í høvuðsheitum fram á sjúkrahúsunum. Harumframt koppsettu starvsfólk í Sjúkrahúsverkinum á ellis- og røktarheimum, útoyggj o.s.fr. Seinni gjørdi COVID-

19 koppsetingarbólkurin  av, at koppsetingin, sum fór fram á sjúkrahúsunum, skuldi flytast til apotekini.

Av tí, at apoteksverkið ikki hevur heimild at koppseta og eingin lækni starvast í apoteksverkinum, koppsettu starvsfólkini í apoteksverkinum eftir delegatión frá serlækna í Sjúkrahúsverkinum. Saman við Fróðskaparsetrinum varð skipað fyri tveimum skeiðum, fyri starvsfólkum í apoteksverkinum, so tey fingu neyðugar fakligar førleikar, áðrenn tey fóru undir at koppseta fyri COVID-19. Seinni var kunngerðin broytt. Broytingin hevði við sær, at Sjúkrahúsverkið hevði ábyrgdina av og skipaði COVID-19 koppsetingina, sum fór fram á apotekunum; meðan Heilsutrygd hevði ábyrgdina av og skipaði COVID-19 koppsetingina, sum fór fram hjá kommunulæknum.

Royndirnar við koppseting fyri COVID-19 á apotekum vístu, at nógv fólk tóku av tilboðnum um koppseting á apotekunum. Fyrimunir við koppseting á apotekunum eru; at stutt er hjá flestu fólkum at koma á eitt av teimum fýra apotekunum í landinum; fólk kunnu velja á hvørjum apoteki tey ynskja at verða koppsett; koppsetingin kann fara fram uttanfyri vanliga arbeiðstíð hjá fólki. Harumframt er tað lætt og ómakaleyst at bíleggja tíð til koppsetingina.

Í nógvum londum kring Føroyar er koppseting á apotekum ein natúrligur partur av heilsutænastunum. Í Danmark bjóða flestu apotekini koppseting fyri influensu, COVID-19 og pneumokokk. Apotekini í Danmark hava í tíðarskeiðinum 1. oktober 2023 til 6. desember 2023 framt 1 millión ókeypis koppsetingar fyri influensu og COVID-19. Umframt tey almennu koppsetingartilboðini, koppseta summi apotek eisini í sambandi við uttanlandsferðir og fyri helvitiseld. Líknandi gongd sæst aftur í fleiri øðrum londum sum til dømis Belgia, Estlandi, Frankaríki, Grikkalandi, Írlandi, Italia, Norra, Portugal, Sveis, Bretlandi, Týsklandi, USA og Avstralia. Royndir frá hesum londum vísa, at tá koppseting kann fara fram á apotekum, taka fleiri fólk av tilboðnum – serliga fólk í vandabólki.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at gera eitt undantak til forboðið fyri, at apotekari kann vera í vinnu sum lækni, tannlækni ella djóralækni.

Við undantakinum fáa apotekini møguleika fyri at bjóða koppsetingar við at gera avtalu við og seta í starv autoriserað heilsustarvsfólk, sum hava heimild til at koppseta sambært autorisatiónslógini, tað er Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed.

Fyri at gagnnýta løttu atkomuligheitina hjá apotekum, verður hildið at apotek skulu hava møguleika fyri at hava ein sjálvstøðugan leiklut í sambandi við at bjóða koppsetingar og verða eitt ískoyti til verandi koppsetingarstøð, sum fólk kunnu velja at nýta. Við uppskotinum verður lætt um arbeiðsbyrðuna hjá læknum, av tí at vegleiðing og hjálp kann fáast til vega á apotekunum.

Lagt verður upp til, at landsstýrisfólkið ásetir reglur um, hvørjar koppsetingar apotek fáa møguleika fyri sjálvstøðugt at bjóða. Apotek fær møguleika fyri einsamalt ella saman við øðrum apotekum at gera avtalu við ella seta í starv eitt heilsustarvsfólk, sum kann koppseta. Starvsfólk á apotekinum kunnu koppseta á sjálvum apotekinum ella fara út á ellis- og røktarheim og aðrastaðni at koppseta.

Tað vil framvegis verða heilsustarvsfólkið, sum hevur heilsufakligu ábyrgdina av koppsetingunum, og heilsustarvsfólkið ella hjálparfólkið hjá heilsustarvsfólkinum, sum koppsetur. Heilsustarvsfólk sett í apoteksverkinum kunnu brúka onnur starvsfólk í apoteksverkinum sum hjálparfólk, sambært vanligu ásetingunum um nýtslu av hjálparfólkum. Heilsustarvsfólkið skal sostatt framvegis tryggja, at hjálparfólkið hevur fingið neyðuga vitan og leiðbeining í sambandi við koppsetingina.

Sambært autorisatiónslógini eru tað einans læknar, sum kunnu koppseta í Føroyum. Ætlanin er at gera broytingar í autorisatiónslógini, soleiðis at sjúkrarøktarfrøðingar fáa møguleika at koppseta sambært autorisatiónslógini. Um so er, at onnur heilsustarvsfólk, til dømis sjúkrarøktarfrøðingar, fáa møguleika at koppseta sambært autorisatiónslógini, verður lagt upp til, at apotek eisini fáa møguleika fyri at gera avtalu við og seta í starv hesi heilsustarvsfólk, til at fremja koppsetingar. Viðmerkt verður, at sáttmálaøki hjá heilsustarvsfólki kann vera avmarkað til ávís setanarpláss. Til dømis kann nevnast, at galdandi sáttmáli millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar ásetir, at sáttmálin fevnir um sjúkrarøktarfrøðingar o.o. sett í starv í Sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum, Heilsutrygd, Gigni, ellis- og røktarheimum o.ø. Um apoteksverkið skal kunna seta í starv sjúkrarøktarfrøðingar undir hesum sáttmála, má sáttmálaøkið eftir avtalu millum sáttmálapartarnar, víðkast til eisini at fevna um apoteksverkið.

Tað er gjørligt hjá læknum at koppseta á apoteki sambært galdandi lóggávu, sum er lýst í pkt. 1.2. Treytin er, at apotekari ikki hevur ein veruligan leiklut í sambandi við koppsetingina. Mett verður, at hetta er ein forðing fyri at røkka málinum um at fáa fólk í vandabólki koppsett.

Koppseting eftir hesi lóg verður framd, sambært galdandi leiðreglum hjá heilsumyndugleikunum um koppsetingar.

Uppskotið hevur eisini til endamáls at strika part B í lógini og gera reglur um heilivág í uppskoti til løgtingslóg um heilivág. Harumframt at strika grein 17, 20 og 21, við tí fyri eyga at staðseta tær við ávísum smærri broytingum í heilivágslógini.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

- Skotið verður upp at gera eitt undantak til forboðið fyri, at apotekari kann vera í vinnu sum lækni, tannlækni ella djóralækni. Skotið verður við hesum upp, at apotekari kann gera avtalu við ella seta í starv heilsustarvsfólk, ið kann koppseta, til tess at koppseta fyri apoteksverkið.

Leikluturin hjá apotekunum við atliti at koppseting, fer at lætta um atgongdina til at lata seg koppseta og væntandi fara fleiri at lata seg koppseta. Hetta fer at virka fyri, at fyribyrgja sjúku og styrkja smittuverjutilbúgvingina í Føroyum.

- Skotið verður upp at strika part B, sum ásetur reglur um heilivág. Uppskotið skal lesast í tí samanhangi, at reglurnar um heilivág verða ásettar í endurskoðaðum líki í uppskoti til løgtingslóg um heilivág.

- Skotið verður upp at strika greinirnar 17, 20 og 21, sum áseta reglur um heilivág, við tí fyri eyga at staðseta tær við ávísum smærri broytingum í uppskoti til løgtingslóg um heilivág.

- Skotið verður upp at broyta heitið læknar til heilsustarvsfólk í løgtingslóg nr. 118 frá 12. desember 2007 um ókeypis koppseting fyri at lógin skal samsvara við løgtingslóg um apoteksverkið við atliti at aktørum, ið kunnu fremja koppsetingina.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landið ella kommunur.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri landið ella kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær avleiðingar fyri millumtjóðarsáttmálar á økinum

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður, at uppskotið sampakkar við tvørgangandi sáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Markaforðingar á apoteks- og heilivágsøkinum fevna um at apoteksverkið ikki kann útflyta heilivág til Danmark og ES, og at einstaklingar til egna nýtslu ikki kunnu hava heilivág við sær til Danmark eftir somu reglum, sum galdandi eru fyri íbúgvar í Danmark, sum koma til Føroya.

Hetta er grundað á, at Føroyar, á heilivágsøkinum, eru at rokna sum eitt triðjaland.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Í § 51 verða tilvísingar til part B og ávísar greinir í parti A strikaðar.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, hvørjar koppsetingar apotek kunnu bjóða. Heimildin í stk. 4 verður í høvuðsheitum brúkt til at áseta reglur um, hvørjar koppsetingar apotek kunnu bjóða.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar við sær.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Til nr. 1:
Fylgibroyting av, at reglurnar um heilivág verða ásettar í endurskoðaðum líki í uppskoti til løgtingslóg um heilivág.

Til nr. 2:
§ 4, stk. 1 ásetir, at apotekari kann ikki vera í vinnu sum lækni, tannlækni ella djóralækni. Innihaldsliga svarar ásetingin til ásetingina í donsku lógini frá 1984, og hevur sín uppruna í donsku apotekaralógini frá 1932, lov nr. 107 af 31. marts 1932 om apoteksvæsenet. Tað stendur í viðmerkingunum til ásetingina, at hon hevur til endamáls at fyribyrgja møguligum misbrúki, sambært "lovforslag nr. LXXXII, jf. Rigsdagstidende 1931-32, tillæg A, spalte 3512". Tað stendur ikki í viðmerkingunum, hvussu forboðið skal tulkast, ella hvat er at skilja sum at vera í vinnu sum lækni, tannlækni ella djóralækni.

Ásetingin hevur við sær, at apotekari ikki kann ávísa heilivág, sum viðkomandi apotekari eftir hetta sjálvur kann selja, og ein lækni ikki kann selja heilivág, sum viðkomandi lækni sjálvur hevur ávíst. Ásetingin kemur til lívs tað, at apotekari – ella lækni – misbrúkar heilivág.

Forboðið móti, at apotekari virkar sum lækni, tannlækni ella djóralækni er eitt persónligt forboð fyri apotekaran. Sambært § 8, stk. 1 er tað apotekarin, sum skipar fyri rakstrinum av apotekinum og hevur ábyrgd av, at virkið verður útint forsvarliga og samsvarandi galdandi ásetanum og givnum fyriskipanum, undir hesum at virka verður ikki sum lækni, tannlækni ella djóralækni á apotekinum. Hetta hevur við sær, at tað virksemi, sum starvsfólkið á apotekunum tekur sær av, er ein partur av persónligu ábyrgdini hjá apotekaranum. Forboðið í § 4 er tí galdandi fyri apotekaran og starvsfólk hjá apotekaranum.

Hetta merkir til dømis, at apotekari ikki kann seta læknar, tannlæknar ella djóralæknar í starv til tess at útinna lækna-, tannlækna ella djóralæknavirksemi, soleiðis at apotekari kann geva harraboð til hesi í stríð við § 4. Apotekari kann sostatt ikki seta ein lækna í starv at koppseta fyri apoteksverkið.

Við uppskotinum verða tillagingar gjørdar til ásetingina, soleiðis at apotekari í ávísan mun fær møguleika at taka lut í koppsetingarvirksemi. Apotek fáa møguleika fyri sjálvstøðugt at bjóða tær koppsetingar, sum landsstýrisfólkið ásetur reglur um, við at seta í starv ella gera avtalu við heilsustarvsfólk, sum kann koppseta sambært autorisatiónslógini. Apotek fær møguleika fyri einsamalt ella saman við øðrum apotekum, at gera avtalu við ella seta í starv eitt heilsustarvsfólk. Starvsfólk á apotekinum kunnu koppseta á sjálvum apotekinum ella fara út á ellisheim og aðrastaðni at koppseta.

Uppskotið hevur við sær, at apotek kunnu taka lut í almenna koppsetingartilboðnum og øðrum koppsetingum á ein meira sjálvstøðugan hátt og skipa eitt koppsetingartilboð innanfyri apoteksverkið.

Tað vil framvegis verða heilsustarvsfólkið, sum hevur heilsufakligu ábyrgdina av koppsetingunum. Heilsustarvsfólkið vil framvegis skula ávísa koppingarevni og hava ábyrgd fyri, at koppsetingin gongur rætt fyri seg. Heilsustarvsfólk kunnu framvegis nýta onnur

starvsfólk, undir hesum starvsfólk sett í apoteksverkinum, sum hjálparfólk sambært vanligu ásetingunum um nýtslu av hjálparfólkum. Uppskotið broytir sostatt bara, hvussu apotek kunnu skipa seg við atliti at bjóða koppsetingar við einum heilsustarvsfólki knýttan at sær.

Uppskotið vísir til eitt heilsustarvsfólk, sum kann koppseta. Hetta er at skilja sum heilsustarvsfólk, ið kunnu ávísa koppingarevni og koppseta sambært autorisatiónslógini. Um onnur heilsustarvsfólk enn læknar fáa heimild at koppseta sambært autorisatiónslógini, fevnir ásetingin eisini um hesi.

Heimildin í stk. 4 verður brúkt til at áseta reglur um, hvørjar koppsetingar apotek kunnu bjóða.

Ásetingin fevnir um koppsetingar, fevndar av almenna koppsetingartilboðnum sambært løgtingslóg nr. 118 frá 12. desember 2007 um ókeypis koppseting móti ávísum smittandi sjúkum. Ásetingin fevnir eisini um aðrar koppsetingar, sum heilivágsbrúkari sjálvur rindar fyri. Til dømis kann nevnast koppseting fyri helvitiseld ella koppseting í sambandi við uttanlandsferðir.

Tað vil framvegis verða heilsustarvsfólkið, sum hevur heilsufakligu ábyrgdina av koppsetingunum, og heilsustarvsfólkið ella hjálparfólkið hjá heilsustarvsfólkinum, sum koppsetur. Heilsustarvsfólk sett í apoteksverkinum kunnu brúka onnur starvsfólk í apoteksverkinum sum hjálparfólk, sambært vanligu ásetingunum um nýtslu av hjálparfólkum. Heilsustarvsfólkið skal sostatt framvegis tryggja, at hjálparfólkið hevur fingið neyðuga vitan og leiðbeining í sambandi við koppsetingina.

Til nr. 3:
Fylgibroyting av, at reglurnar um heilivág verða ásettar í endurskoðaðum líki í uppskoti til løgtingslóg um heilivág.

Til nr. 4:
Fylgibroyting av, at reglurnar um heilivág verða ásettar í endurskoðaðum líki í uppskoti til løgtingslóg um heilivág.

Til nr. 5:
Fylgibroyting av, at reglurnar um heilivág verða ásettar í endurskoðaðum líki í uppskoti til løgtingslóg um heilivág.

Til nr. 6:
Fylgibroyting av, at reglurnar um heilivág verða ásettar í endurskoðaðum líki í uppskoti til løgtingslóg um heilivág.

Til nr. 7:
Fylgibroyting av, at reglurnar um heilivág verða ásettar í endurskoðaðum líki í uppskoti til løgtingslóg um heilivág.

**Til § 2**
Uppskotið leggur upp til, at apotekið kann gera avtalu við og seta í starv heilsustarvsfólk, ið kann koppseta. Harumframt at tað er heilsustarvsfólkið, sum hevur heilsufakligu ábyrgdina av koppsetingunum.

Sambært autorisatiónslógini eru tað einans læknar, sum kunnu koppseta í Føroyum. Um so er, at onnur heilsustarvsfólk, til dømis sjúkrarøktarfrøðingar, fáa møguleika at koppseta sambært autorisatiónslógini, verður lagt upp til, at apotek eisini fáa møguleika fyri at gera avtalu við og seta í starv hesi heilsustarvsfólk, til at fremja koppsetingar.

Fyri at løgtingslóg um ókeypis koppseting móti ávísum smittandi sjúkum skal samsvara við løgtingslóg apoteksverkið við atliti at aktørum, ið kunnu fremja koppsetingina, verða læknar broytt til heilsustarvsfólk í § 2, stk. 1, nr. 3.

**Til § 3**
Mett verður ikki, at viðmerking er neyðug.

Heilsumálaráðið, dagfesting.

**Margit Stórá**
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: